sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
Blaðfólk: Dagny Joensen, Áki Bertholdsen, Emil L. Jacobsen, Sveinur Poulsen, Turið Kjølbro
Ljósmyndari: Jens Kristian Vang
Lýsingar og søla: Jonhard Hammer
Útgevari, uppseting og prent: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argjum
Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 11820
Telefax. 14720
e-mail: post@sosialurin.fo

Nýggir og áhugaverdir tónar

Oddagrein

TAÐ eru óhugaverdir tónar, sum koma frá Tinganesi og Christiansborg í hesum døgum. Eftir tí sum Sosialurin hevur fingið at vita, so er landsstýrið nú sinnað til at samráðast við danir um bæði bankaendurgjald og uttanlandsskuld undir einum. Haraftrat er danska stjórnin sinnað til at ganga føroyingum á móti í sjálvstýrismálinum og er sinnað til at fáa loyst skuldarspurningin so ella so. Danmark hevur ongan áhuga í at hava leiklutin sum hjálandaveldi mótvegis Føroyum sigur Lykketoft í samrøðu við blaðið í dag.

HVAT viðvíkur tí at samráðast um bankaendurgjaldið og sjálva skuldina til Danmark undir einum, so eru tað nýggir tónar frá føroyskari síðu. Tí higartil hevur verið hildið fast uppá, at bankaendurgjaldsspurningurin skal als ikki tengjast saman við spurninginum um sjálva skuldina. Tað hevur so eftir øllum at døma eydnast danska fíggjarmálaráðharranum undir vitjan síni í Føroyum at sannføra landsstýrið um, at tað er skilagott at tosa saman um og tengja bæði bankaendurgjald og skuld saman. Haraftrat kemur so eisini spurningurin um blokkin.

HETTA er so ikki í tráð við tey signal, sum fingust úr Tinganesi seinast fríggjakvøldið eftir fundin millum Lykketoft og landsstýrið. Tá varð nevniliga hildið, at partarnir stóðu langt frá hvørjum øðrum, og at Lykketoft var farin aftur til Danmarkar sum av torvheiðum.

NÚ hava vit so orðini hjá Lykketoft og eisini frá landsstýrinum um, at partarnir eru kanska ikki so langt frá hvørjum øðrum, sum annars hildið. Hetta er so ein nýggj og áhugaverd støða. Tað, sum er mest umráðandi, er at føroyingar og danir semjast um nakað, sum gagnar í fyrsta lagi Føroyum, sum er vorðið snýtt í bankamálinum. Hinvegin eru tað danir, sum hava tikið um endan í skuldarspurninginum, og tí er tað greitt, at her eru tað báðir partar, sum seta dagsskránna, og ikki bara annar parturin, soleiðis sum tað var í flestu førunum, tá landsstýrini fóru til Danmakar at samráðst fyrst í 90-unum.

SJÁLVANDI hevur tað týdning fyri Føroyar at verða reinsaður í bankamálinum og at fáa uppiborið endurgjald. Í hesum sambandi er tað eisini umráðandi, at danir viðganga síni mistøk. Hinvegin eru tað danir, sum standa sum lángevari, tá talan er um skuldina. Og har mugu vit so bara biðja til, at teir vilja vísa ein góðan vilja. So samanumtikið er her talan um at fáa tveir partar at lurta og tosa við virðing hvør fyri øðrum.

ANNARS kundi tað verið áhugavert at fingið at vita, hvat andstøðuflokkarnir á tingi halda um nýggju støðuna, ið hevur tikið seg upp, nú landsstýrið einki hevur ímóti at tengja spurningin um bankaendurgjald og um skuldina saman. Tí nettup fyrrverandi løgmaður hevur alla tíðina greitt víst á, at hesi bæði tingini máttu ikki blandast saman.

Sosialurin

Poul Nicolopulo, politiskur skrivari á bretsku sendistovuni í Danmark:

Rokni við loysn í marknatrætu innan nakrar mánaðir

Nú nýggjar stjórnir hava tikið við bæði í Føroyum og Bretlandi og fyri tað eisini í Danmark átti at borið til at funnið eina loysn á áralangu marknatrætuni heldur politiski 1. skrivarin á bretsku sendistovuni í Keypmannhavn, Poul Nicolopulo, sum vitjar í Føroyum í hesum døgum. Hann heldur ikki, at tíðin er komin til at taka málið upp á hægsta politiska stigi. Tað eigur at bera til at loysa tað við samráðingum - og tað innan nakrar mánaðir

JAN MULLER

Í gjár kom politiski fyrstiskrivarin á bretsku sendistovuni í Keypamannahavn, Poul Nicolopulo á kunnandi vitjan í Føryum. Hetta er fyrst og fremst fyri at hitta umboð fyri nýggja tingið og landsstýrið eftir valið men eisini fyri at láta føroyingar vita, at bretska stjórnin fegin sær, at ein avtala verður gjørd millum Føroyar og Bretland um markið millum londini innan ikki ov langa tíð.

Poul Nicolopulo er sjálvur limur í bretsku samráðingarnevndini og hevur tí fylgt væl við í marknatrætuni. Hetta er heldur ikki fyrstu ferð, at hann er í Føroyum.

-Eg vóni sjálvandi, at broyttu tíðirnar við nýggjum stjórnum í bæði Føroyum og Bretlandi og fyri tað eisini í Danmark - saman við útlitinum fyri einum góðum summari og heystikunnu geva øllum pørtum í marknamálinum eitt nøktandi úrslit sigur Poul Nicolopulo sum leggur aftrat, at fyri at kunna røkka á mál í slíkum samráðingum, so mugu allir partar slaka - um so er, at ein ikki ynskir at fara til dómstólin við málinum.



Tjúkka strikan næst Føroyum er upprunaliga bretska kravið og millum trappurnar sæst verandi fiskimark. Eftir tí Sosialurin skilur, so kemur undirgrundarmarkið at liggja árakað verandi fiskimark men kanska eitt sindur vestanfyri. Harvið verður Hvíta økið býtt í helvt ella harum.

Eingin vil til Haag

-Eg kann ikki ímynda mær, at hvørki føroyingar ella danir vilja fara til dómstólin við hesum málinum. Tað er í hvussu er ynskið hjá bretsku stjórnini at kunna loysa hetta málið við samráðingum millum góðar grannar og vinir. Tað tænir ikki góðum grannalag at avgera eitt mál í rættinum. Tá eigur samráðingarleiðin at verða roynd út í æsir fyrst.

Uppá fyrispurning hví umstøðurnar fyri at røkka eini loysn skulu vera so nógv betri nú enn undan løgtingsvalinum sigur Poul Nicolopulo, at tað er greitt, at eitt nú bretska stjórnin stendur nógv sterkari enn teir konservativu gjørdu tað. Tony Blair hevur so dygga undirtøku í fólkinum, at stjórnin lættari fær gjørt eina avtalu við føroyingar. Sama kann sigast um nýggja landsstýrið, ið eisini hevur ein tryggan meiriluta aftanfyri seg - umframt ta uppbakking, sum málið annars hevur fingið frá øllum flokkum. Eisini hevur tað nógv at siga, at talan er um eina nýggja stjórn við einum nýggjum leiðara, sum tá ikki er so bundin at tí farna. Anfinn Kallsberg løgmaður hevur so fingið eitt nýtt mandat í og við, at tað nú er hann, sum skal seta út í kortið.

Valið blokeraði

Poul Nicolopulo heldur, at fyrrv. løgmaður Edmund Joensen var kanska í eini meiri torførari støðu fyrr í ár, tí val skuldi vera og hevur hetta gjørt sítt til, at landsstýrið ikki hevur kunnað skundað undir málið.

Eg haldi, at myndin nú er meira greið, og so er veðrið eisini betri leggur ein bjartskygdur Poul Nicolopulo aftrat. Hann heldur, at góður møguleiki er fyri at finna eina loysn og sær fyri sær eina avgerð innan nakrar mánaðir. Tvs. einaferð í heyst ella harumkring.

Oljuidnaðurin vil hava loysn

Spurdur um ikki oljuídnaðurin leggur trýst á bretsku stjórnina at fáa marknamálið loyst sigur Poul Nicolopulo, at oljuídnaðurin sær fegin, at málið verður loyst, tí stórur áhugi er fyri at leita eftir olju í hesum partinum av heiminum. Hann viðgongur, at oljuidnaðurin hevur latið bretsku stjórnina vita, hvønn týdning hann leggur í bæði Hvíta økið og føroyska økið sum framtíðar oljuøki.

Hvat viðvíkur ynskinum hjá fyrrv. løgmanni at fáa málið uppá hægsta politiska stig, so eru bretar sannførdir um, at hetta enn ikki er neyðugt, tí tað eftir teirra hugsan eigur at bera til at finna eina loysn á vanliga samráðingarháttin.

Poul Nicolopulo vísir annars aftur, at bretar skulu hava áhuga í at drála við málinum, nú føroyingar hava slíkan skund í sambandi við tí fyrstu útbjóðingina.

-Vit eru sjálvandi varugir við, at føroyingar ætla at hava eina fyrstu útbjóðing, og at tað verður mett óheppið, at markið ikki er komið uppá pláss áðrenn tað. Men vit hava frá bretskari síðu onga áhuga í at brúka hetta til at trýsta føroyingar upp í ein krók. Vit meta, at báðir partar eiga at kunna gera eina neyðsemju, sum ber í sær, at báðir partar kunnu vera nøgdir. Alternativið er

Hjertelig tak

for den overvældende deltagelse, der blev vist os, ved min kære hustru

AGNES CHRISTENSEN

død og begravelse.

Også en stor tak fra børn, børnebørn og svigerdatter, tak for kranser, blomster, breve samt hilsener, som vi har modtaget fra nær og fjern, tak allesammen.

På familiens vegne
Boi E. Christensen